# EYSTUROYAR DANSIFELAG

Tann 04.okt. 2021

**Skráin fyri veturin 2021-2022**

Vit halda til í Hæddini, Heiðavegi 19, Saltangará, vanliga fríggjakvøld kl. 21 til út ímóti midnátt.

Skráin er - øll sum hon er - kent stoff, men orðið er frítt, so vit gleða okkum til nógva kvøðing.

Í kvæðabók okkara á **eystdans.dk** finst alt tað, sum er á skránni í vetur. Nakrar hentar kvæða- og vísubøkur eru: Fær. Anthologi, Grør so fagurt, Danske kæmpe- og folkeviser, Gyltabók, Nýggja kvæðabókin 1&2, Stígum fast og Kvæði Vísur og Táttar.

Vertir hava vit loyvt okkum at seta, ofta uttan at spyrja; men ber tað ikki til at vera vertur, kunnu tit vinarliga siga nevndini frá.

| | | |
|---|---|---|
| 22/10 | Hin føroyski dansurin, Ivan.<br>Leirvíks Páll, Kathrina. | Vertir: Nevndin. |
| 29/10 | Jákup á Møn, Joen Carl.<br>Herr Sinklar, Jóannes. | Vertir: Jónhild og Marjun. |
| 05/11 | **Brúðardansur, kl. 20 til 21.** Súsonnu vísa, Kristian; I ærlige brudefolk, Ivan.<br>**Kl. 21.** Bøhmerlands dronningen, Anfinnur; Fisken, Jóannes; Brúðarvísan IPG, Kristian. Kaffisteðgur. *Emil Olsen, prestur, hugleiðir um brúðarvígslu.* Harra Pætur og Elinborg, Elin; Kong Hans, Kathrina; Leivur Øssursson, Jón Rói. | Vertir: Erla og Andrea. |
| 12/11 | **Kl. 20.30. Jógvan Højsted greiðir frá um Kjartan Ólavsson**<br>Kjartan Ólavsson, fyrri táttur, Kristian og Jón Rói. | Vertir: Kathrina og Liljan. |
| 19/11 | **Táttakvøld**. Vit kvøða stutt og lætt. Nógv ymisk skipa. Meir um hetta seinni. | Vertir: Aslaug og Tóta. |
| 26/11 | Spanieland og Myklegård, Hans.<br>Gudbrandskvæði, Louis. | Vertir: Sunneva og Elsa. |
| 03/12 | **Á Strondum**, í Pensionistahúsinum, Heygsstøð 3.<br>Bjarnabani, Elin.<br>Strandatáttur, Joen Carl. | Vertir: Kára og tær á Strondum. |
| 10/12 | Kong Sverke, Høgni<br>Finnbogaríma, Anfinnur. | Vertir: Súsanna og Dagny. |

| | | |
|---|---|---|
| 07/01-22 | Seyðamaðurin á Sondum, Andras.<br>Blakman konge, Hans. | <br>Vertir: Margretha og Pálin. |
| 14/01 | **Í Glyvr'Hanusarhúsi, Norðragøtu**<br>Hørpuríma Anna og Sanna.<br>Vaagen, Anfinnur. | <br><br>Vertir: Sanna, Anna og Hanna. |
| 21/01 | **Blíðskaparkvøld**<br>Norðstreymingar eru bodnir við.<br>Ormurin langi, Louis og Anfinnur. | <br><br>Vertir: Nevndin. |
| 28/01 | **Aðalfundur**, skrá eftir lógini.<br>Snekken ligger på landet, Sjúrður. | <br>Vertir: Anna Maria og Anna J. |
| 04/02 | Vit fara til **Harðaldssunds**. Felagið leigar buss: frá Hæddini kl. 21.00 og steðga á vanligum støðum. Farið verður til hús kl.02.00 – ella kl. 02.30, um dansurin er góður.<br>Kópakvæði, Karstin. | |
| 11/02 | Brúsajøkil, Hans.<br>Der går dans på Ribergade, Leivur. | <br>Vertir: Nevndin. |
| 18/02 | **Hugnakvøld**, byrja kl. 20.00. Tekning – meir seinni.<br>Jeg ser så mangt et orlogsskib, Ivan. | |

Nýggjárskvøld og fastalávints mánakvøld er opið frá 20.30 til uml midnátt. Øll vaksin gjalda atgongumerki kr. 50,-.

**Barnadansur.** Foreldur í Gøtu hava barnadans í **Glyvr'Hanusarhúsi** í Norðragøtu mánakvøld kl. 19.00-20.00. Boð fáast á facebook: *Føroyskur dansur fyri børn.* Í **Hæddini** verður barnadansur kl. 19.00-20.00 vanliga tey fríggjakvøld, sum vit eru í Hæddini. Kristian fer at taka sær av tí. Meira um tað seinni.

**Kunning** fáa limir okkara pr. e-post, á eystdans.dk og á Facebook: Eysturoyar dansifelag.

**Limagjaldið fyri 2021**, kr. 100,- verða limirnir bidnir at um at flyta í **BankNordik, konto 6460 407 961 4**. Viðmerking við gjald: navn/nøvn. Einki annað er neyðugt. (Tey, sum hava fasta flyting til um ársskiftið, hava longu goldið fyri 2021).

*Felagið er stovnað í 1969 og hevur til endamáls at savna fólk saman til góðan føroyskan dans og stimbra áhugan fyri dansinum. Limatalið er u. l. 120, og vanlig kvøld eru vit 25 til 40 fólk í dansi.*